# Det er løgn og klaffer i deres mund!

SUSANNE MADSEN

Der har i de seneste dage været fremsat alvorlige beskyldninger mod barnaverndarumsitingin i Suðuroy i form af anklager om samarbejdsproblemer og uprofessionalisme i sagsbehandlingen. Jeg havde i første omgang ikke tænkt mig at kommentere sagen i medierne, men har grundet de gentagne beskyldninger alligevel valgt at bryde tavsheden.

Lad os da se på hvad jeg og barnaverndarumsittingin bliver beskyldt for.

Det er fremført at der er alvorlige samarbejdsproblemer mellem børneværnet og institutioner i Vágur og Porkeris kommuner. Jeg og mine medarbejdere har, siden denne påstand første gang blev ført frem på et møde d. 9. okt., talt med alle skole- og institutionsledere i de pågældende kommuner bortset fra lederen af Vágs dagpleje, som var bortrejst. Dette med henblik på at få afeller bekræftet påstanden. Endvidere har vi talt med ledelsen af daginstitutionerne i Tvøroyri, skolesundhedsplejersken i Vágs Skúla og en familierådgiver som børneværnet samarbejder med.

På baggund af oplysninger, som kom frem på nævnte møde, om at; ingen af skole- og institutionslederne havde tillid til barnaverndarumsittingin og at ingen af samme årsag ønskede at samarbejde med børneværnet, og derfor ikke kontaktede os selvom dette skulle vise sig nødvendigt, har vi spurgt samtlige vi har talt med om dette var tilfældet. Den generelle opfattelse hos institutionslederne i de 2 kommuner er at de ikke har haft så meget med børneværnet at gøre. På baggrund af det samarbejde der har været er det opfattelsen at der ikke er problemer med at samarbejde med børneværnet, at der ikke er mistillid til børneværnet og at man selvfølgelig vil kontakte børneværnet hvis dette skulle blive nødvendigt. Undtagelsen fra denne opfattelse er Vágs Skúla, som giver udtryk for at have problemer i forhold til børneværnet.

Det fremgår altså der ikke er samarbejdsproblemer mellem barnaverndarumsittingin og 9 ud af 10 af dennes samarbejdspartnere. At samarbejdsproblemer mellem skoler/institutioner i Porkeri og børneværnet skulle være årsag til samarbejdsaftalens ophør, er således lodret løgn. Ligeledes synes det at være et noget spinkelt grundlag at basere en samarbejdsopsigelse på utilfredshed fra én institution i Vágur, nemlig Vágs Skúla.

Den anden anklage går på at barnaverndarumsittingin ikke håndterer arbejdet professionelt, samt at Vágur og Porkeris kommuner ikke får den service de har betalt for.

Hvis vi tar' spørgsmålet om service først. Den service børneværnet skal yde er at sørge for, at børn/familier som har brug for hjælp, får den hjælp de har behov for. Manglende service er således misrøgt af opgaven, og dermed en alvorlig sag. Det er derfor ikke noget som jeg, hvis dette skal være troværdigt, selv kan afsande. Jeg har derfor sendt sager der har været henvist til, under forløbet omkring samarbejdsaftalens opsigelse, til ekstern revision.

Angående spørgsmålet om professionalitet. At arbejde professionelt i en forvaltning indebærer efter min opfattelse, at man overholder reglerne for god forvaltningsskik. Altså at alle borgere får en saglig, regelret og ensartet sagsbehandlling med grundlag i gældende lovgivning. Hvorvidt sagbehandlingen i barnaverndarumsittingin er i orden og i tråd med gældende lovgivning er et punkt som revisionen også er blevet bedt om at se på.

Det er således for indeværende ikke muligt at afeller bekræfte disse anklager på objektiv, troværdig vis. Det er dog naturligvis min opfattelse at jeg og mine medarbejdere har handlet både professionelt og lovmedholdeligt i vores daglige arbejde.

Nu barnaverndarumsittingin er beskyldt for ikke at håndtere arbejdet tilfredsstillende og professionelt, vil jeg i relation til spørgsmålet om professionalitet kort rette opmærksomheden mod Vágur og Porkeris kommuners håndtering af spørgsmålet om deres utilfredshed med børneværnet.

Håndteringen af denne sag må siges at være både uprofessionel og dadelværdig. Anklager mod barnaverndarumsittingin, fremsat på et møde d. 9. okt. '08, blev fremsat med henvisning til udtalelser fra andre interessenter på børneområdet, som blev refereret mundtligt og annonymt. Det var således ikke muligt at respondere og kommentere på disse. I mødereferatet som efterfølgende blev tilsendt var udeladt store dele af mødet, heriblandt referat fra samtaler om barnaverndarumsittingin som vi var forment adgang til. Først på begæring om aktindsigt, og først efter den maksimale tidsfrist, fik vi indblik i anklagerne mod os. Disse var dog refereret annonymt.

Barnaverndarumsittingin mangler endvidere stadigt at se objektiv, verificerbar dokumentation på de fremsatte påstande. Ligeledes mangler, trods begæring om aktindsigt i dette spørgsmål, at blive fremlagt dokumentation for specifikke påstande fremsat på nævnte møde d. 9. okt.. Vágur og Porkeris kommuners håndtering af denne sag rummer således adskillige overtrædelser af såvel forvaltningsloven, som god forvaltningskik.

# Kunning um skuld, rakstur og gjaldføri hjá Klaksvíkar kommunu

ÓLI M. LASSEN

stjóri
Listi A



**Sum flest øll vita, so hava tað verið góðar tíðir og fleiri kommunir hava ført ein ekspansivan fíggjarpolitik. Hetta hevur eisini verið við til at yvirupphita búskapin í samfelagnum. Tað er óheppið, at Klaksvíkar kommuna – nú tað ikki er so nógv ferð innan privat byggivinnu o.a., ikki er før fyri at seta arbeiðir í gongd, soleiðis at entreprenørar og lastbilaeigarar o.a., kunnu gera kommunal arbeiðir, nú minni er at gera í privatu vinnuni**

**Klaksvíkar Kommuna skyldar meria enn eina alíkning**
Samlaða skuldin hjá Klaksvíkar Kommunu verður 1. januar 2009 omanfyri 170 milliónir kr. Í 2008 verða goldin rentur og avdráttir fyri góðar 14 mió. Krónur, og í 2009 verða rentur og avdráttir umleið 18 milliónir kr. Hetta er ein øking við 4 mió. Kr.

Í 2009 kemur Norðhavnin inn í kommunuroknskapin, og um vit gera skuldina upp, so eru lánini 133 mió. krónur og stuttfreistað skuld áleið 15 mió. krónur, meðan skuldin í Norðhavnini er á leið 23 mió. krónur. Tilsamans gevur hetta eina skuld upp á 171 mió. Kr. Vit kunnu rokna við, at ein alíkning er á leið 138 mió. krónur, so er talan um at Klaksvíkar kommuna skyldar 35 mió. krónur meir enn eina ein alíkning. Neyðugt er, at kommunan fær hetta í rættlag sum skjótast.

**Rakstur og gjaldførið hjá Klaksvíkar Kommunu**
Sum heild má sigast. at raksturin hjá kommununi er galoperaður tey seinastu árini. Hækkandi inntøkur hava ført til munandi øking í rakstrarútreiðslunum. Saman við íløgum og rakstri hevur kommunan tey seinastu fýra árini nýtt munandi meir, enn tað sum er komið inn í skatti og øðrum inntøkum. Hetta saman við, at tað er trupult at fáa lán orsakað av fíggjarkreppuni í heimunum, hevur ført til, at støðan er tann, at kommunan í dag hevur vánaligt gjaldføri.

Raksturin – barnaansing, mentan, fyrisiting

Eg skal her bert viðgera nøkur av teimum økjum í rakstrinum hjá kommunun, i sum eru økt sera nógv. Í stuttum kann sigast, at tað eru hend sera stór lop í rakstrinum, og tað er eftir mínum tykki ikki íløgur ella fíggjarstýringin, sum er tað sentrala økið at koncentrera seg um í dag. Men hinvegin er tað raksturin og búskaparstýringin og bygnaðurin hjá kommununi, sum má viðgerast.

**Barnaansing og annað**
Eftir at kommunan yvirtók barnaverndarøkið og barnaansingina, eru útreiðslurnar á hesum øki øktar munandi. Hetta er ein stórur partur av rakstrinum hjá kommununi upp á eini 23 prosent. Í 2000 vóru útreiðslurnar slakar átta mió. krónur, og í 2008 vóru útreiðslurnar góðar 30 mió. krónur. Tað merkir, at útreiðslurnar í 2008 eru góðar 22 mió. krónur hægri, enn tær vóru í 2000. Men tað er at frøast um, at kommunan hevur megnað at fáa fleiri ansingarpláss, tí neyðugt er, at hetta økið er væl útbygt.

**Mentunarmál**
Innan mentunarøkið er økingin eisini sera stór. Í 2000 vórðu brúktar góðar fýra mió. krónur, og í 2008 er metingin 13 mió. krónur. Hetta eru heilar níggju mió krónur meira enn í ár 2000.

**Kommunal umsiting**
Innan kommunalu umsitingina er økingin eisini sera stór. Í 2000 var kostnaðurin av umsitingini góðar seks mió. krónur, og í 2008 er metingin, at umsitingin kostar á leið 15 mió. krónur. Hetta eru heilar 8,5 mió kr. meir enn í ár 2000. Partur í vøkstrinum stavar eisini frá, at kommunan yvirtók barnaverndina, sum í 2008 kostar eina góða mió. krónur í rakstrinum.

**Raksturin nógv øktur frá 2000 til 2008**
Í ár 2000 var raksturin 45 prosent av inntøkunum, í 2004 69 prosent, og í 2008 er metingin, at raksturin verður heili 72 prosent av inntøkunum. Hetta vísir í allar mátar, at her er grundleggjandi neyðugt við økonomistýring, um gjaldføri skal vera tókt, og íløgur kunnu gerast framyvir. Klaksvíkar kommuna er í dag ein væl útbygd kommuna, sum tó hevur ov nógva skuld og vánaligt gjaldføri. Eg fari at leggja fleir útgreiningar á heimasíðu mína: www.omlassen.com

# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**44. partur**

Áttandi, níggjundi, tíggjundi og ellivti kap. í opinberingini siga frá um øðiligar dómar, sum skulu ganga yvir jørðina, og at Kristus tekur ríkið.

Í kap. 10,5-7 standa hesi álvarsomu orð: Eingilin, ið eg sá standa á havinum og jørðini, lyfti høgru hond móti himli og svór um Hann, sum livir í aldur og allar ævir, Hann, sum hevur skapt himmalin og tað, sum honum er í, jørðina og tað, sum henni er á, og havið og tað, sum tí er í, at eingin tíð skal verða givin meir, men at á teimum døgum, táið rødd hins sjeynda eingils ljóðar - táið hann blæsur í lúður - er dulda ráð Guds fullført, eins og Hann hevur kunngjørt tænarum Sínum profetunum tað.

Og kap.11,15-18 sigur hetta: Sjeyndi eingilin blásti í lúður; tá hoyrdust í Himli harðar røddir, ið søgdu: "Kongadømi heimsins er fallið Harra okkara og hinum salvaða Hansara í lut, og Hann skal vera kongur í aldur og allar ævir!" Hinir 24 elstu, sum sita í hásætum sínum fyri ásjón Guds, fullu niður á andlit síni, tilbóðu Gud og søgdu: "Vit takka Tær, Harri Gud, Tú Alvaldi, Tú, sum ert, og sum vart, at Tú hevur tikið stóra mátt Tín og ert vorðin kongur!

Fólkasløgini vórðu vreið; men vreiði Tín er komin, og tíðin táið hini deyðu skulu verða dømd, og táið Tú skalt løna profetunum, tænarum Tínum, og hinum heiløgu og teimum, ið óttast navn Títt, hinum smáu og hinum stóru - og táið Tú skalt oyða tey, sum oyða jørðina.

Tólvti kap. sigur okkum, at djevulin, hin gamli ormur, verður tveittur úr himli og niður á jørðina, hann verður lýstur her sum ein dreki. Hann hevur sjey høvd og tíggju horn. Djevulin áklagar Guds børn. Vit síggja tað t.d. í jobsbók 1. kap. og hjá Zacharias profeti 3. kap.. Men einaferð verður hann koyrdur burt frá ásjón Guds med alla.

Hin stóri dreki varð kastaður niður, hin gamli ormur, sum kallast Djevulin og Satan, hann, ið villleiðir allan heimin; hann varð kastaður niður á jørðina, og einglar hansara vórðu kastaðir niður við honum.

Eg hoyrdi harða rødd í Himli siga: "Nú eru frelsan, mátturin og ríkið vorðin Guds okkara, og veldið hins salvaða Hansara! Tí klagari brøðra okkara er kastaður niður, hann, sum klagaði teir fyri Gudi okkara dag og nátt. Op. 12,9-10.